# P/F Poul Michelsen samtakið

# Samfelagstilvit 2023/24






## Innihaldsyvirlit

Leiðsluboðskapur s. 3
Um PM samtakið s. 4 - 5
Starvsfólk og trivnaður s. 6 - 7
Veðurlagsbroytingar og $CO_2$ útlát s. 8 - 9
Lívmargfeldi, innkeyp og burturkast s. 10 - 11
Stuðul og samfelag s. 12

# PM í 50 ár og fyrireiking til tey næstu 50

P/F Poul Michelsen hátíðarhelt í ár, at 50 ár eru liðin, síðan felagið varð stovnað av Poul og Sólrun Michelsen heima í kjallaranum í Gundadali. Nógv hevur verið gjørt burturúr runda ársdegnum og hevur tað verið heilt serligt at sæð, hvussu nógv fólk, fyritøkur, veitarar og onnur hava fegnast saman við okkum. Vit vilja her nýta høvið at takka fyri allar heilsanir, vitjanir og uppmerksemi annars.

Hendan frágreiðing er hin fyrsta av sínum slag í PM samtakinum. Tað eru fleiri orsøkir til, at vit meta tað vera týdningarmikið at fara undir slíka frágreiðing, men samanumtikið er tað fatanin av, at fíggjartøl ikki einsamøll geva eina lýsing av samtakinum. Vit ynskja at varpa ljós á aðrar partar av fyritøkuni, sum hava eins stóran týdning.

Seinastu árini hava vit hoyrt nógv um veðurlagsbroytingar og hvussu hetta væntast at ávirka okkara heim. Allar fyritøkur mugu hyggja inneftir og taka ábyrgd av tí ávirkan, sum stendst av teirra virksemi. Eisini verður nógv tosað um ovurframleiðslu og ovurnýtslu kring heimin, sum leiðir okkum til tørvin á burðardygd í virkseminum.

Starvsfólk raðfesta øðrvísi í dag enn áður og tí er umráðandi at vit flyta okkum, soleiðis at vit framhaldandi kunnu vera ein fyritøka, har fólk trívast, støðast og mennast.

Nevnd og stjórn hava seinastu árini lagt orku í at finna útav, hvussu okkara samtak kann virka meira burðardygt. Fyri 3 árum síðani gjørdist hetta arbeiðið meira skipað, tá PM saman við 11 øðrum fyritøkum stovnaðu Burðardygt Vinnulív. Samstarvið hevði til endamáls at fáa til vega vitan og menna førleikar, so fyritøkurnar kundu seta sær mál og arbeiða fyri at røkka teimum.

Ein partur av hesum arbeiði var fyrireiking til at geva út ESG frágreiðing. Hendan fyrsta frágreiðingin miðar ímóti at skapa eitt grundarlag, sum vit komandi árini kunnu byggja uppá.

Nevnd og Stjórn



**Viðmerkingar til frágreiðing**

- Nøkur av rapporteraðu tølunum taka støði í 2023 og onnur eru byrjaði áðrenn
- Summi av tølunum hava málsetning knýttan at sær og onnur verða einans rapporterað í fyrstu atløgu
- Frágreiðingin er ikki grannskoðað og vit nevna tí hesa fyrstu útgávu ”samfelagstilvit” og ætlanin er, at vit arbeiða ímóti eini ESG frágreiðing, sum lýkur altjóða ásetingar og verður grannskoðað

## Samtakið P/F Poul Michelsen

P/F Poul Michelsen heilsøla varð sett á stovn í 1974 og heldur til við Hoyvíksveg 74 í Havn. 59 fólk starvast í PM við tí endamáli at vera virkin á føroyska matvørumarknaðinum og soleiðis tryggja kapping, góðsku og fjølbroytni

Á Hoyvíksvegnum er køli -, frysti- og turrgoymsla, bilkjallari, vaskipláss, tænastuverkstaður, skrivstovur, fundarhølir, matstova og parkeringspláss

Sp/f Atlas Flutningur er dóttirfelag hjá P/F Poul Michelsen. Gulu bilarnir síggjast kring alt landi - so at siga allar gerandisdagar í árinum

Sp/f Atlas Flutningur eigur allar flutningsbilarnar og hevur sáttmálar við PM og aðrar fyritøkur um flutning. Teir gulu bilarnir eru serbygdir til at koyra við mjólk og niðurkøldum vørum og soleiðis tryggja, at brúkarin fær fríska vøru

P/F PM Pluss, sum heldur til á Mannaskarði 4, varð stovnað í 2009 og er dóttirfelag hjá P/F Poul Michelsen. Hjá PM Pluss starvast 110 fólk úr 18 ymiskum tjóðum

PM Pluss veitir professionella reingerðartænastu, har dentur er lagdur á burðardygd - bæði í mun til fólk, amboð og vørur. Vitan og førleiki gera, at stovnar, skrivstovur, handlar og framleiðslufyritøkur trygt kunnu velja PM Pluss sum veitara

Veitsla.fo byrjaði sítt virksemi í 2017 og heldur til hjá PM Pluss á Mannaskarði 4. Veitsla.fo leigar út til størri og smærri tiltøk og miðar eftir, at kundarnir skulu fáa alt á einum stað

Missiónin hjá Veitsla.fo er, at føroyingar kunnu leiga heldur enn at eiga. Tá slepst undan, at øll keypa stórar nøgdir, sum einans vera brúktar fáar ferðir. Veitsla.fo leggur soleiðis dent á at finna burðardyggar loysnir og at vøran kann endurnýtast ferð eftir ferð

Kjøtbúðin byrjaði sína framleiðslu í 1921 og andin við dygdargóðum rávørum og handverki heldur áfram í einum nýmótans matvøruvirki.

Nærlagni og gomlu uppskriftirnar trívast sum fyrsta dagin. Serliga er tað væl umtókta rullupylsan, sum í dag eyðkennir Kjøtbúðina



**PM samtakið 2023/24 - stutt sagt**

| | |
|---|---|
| Virkið í | 50 ár |
| Starvsfólk | 178 |
| Tjóðskapir | 24 |
| Umsetningur | 315 mió. kr. |
| Lønarútgjaldingar | 56 mió. kr. |
| Kundar PM | 1.490 |
| Reingerðarkundar | 113 |

**PM samtakið 2023/24 - stutt sagt**

| | |
|---|---|
| Fermetrar grundøki | 18.500 m2 |
| Fermetrar bygningar | 10.000 m2 |
| Fermetrar køligoymsla | 1.600 m2 |
| Fermetrar frystigoymsla | 1.700 m2 |
| Fermetrar turrgoymsla | 2.600 m2 |
| Akfør | 35 |
| Vøruskrá PM | 4.824 vørur |





## Starvsfólk og trivnaður

Eingin fyritøka uttan starvsfólkini.

PM samtakið hevur nógv starvsfólk við høgum starvsaldri og eisini ung fólk, sum arbeiða í eina tíð, áðrenn tey fara víðari at nema sær útbúgving ella royna nýggjar leiðir. Eisini eru nógv, sum koma til landið frá øðrum, til tíðir fjarskotnum, londum. Tað er stórur tørvur á arbeiðsmegi í Føroyum og tilflyting er neyðug, um menning og vøkstur í samfelagnum skulu halda fram.

Tað liggur ein týdningarmikil uppgáva hjá arbeiðs-gevarum at fáa øll at trívast og mennast, tí ymiskleikin er stórur og tørvirnir vítt fevnandi.

PM samtakið leggur dent á tað góða arbeiðs-umhvørvið, har virðingin fyri einstaka menniskjanum er í hásæti og tónin millum fólk er léttur og jaligur. Eyðkent fyri PM samtakið er, at stutt er ímillum leiðslu og starvsfólk - øll hjálpast at og taka eina hond í, tá á stendur.

Sosial tiltøk eru við til at skapa relatiónirnar, sum skulu fáa alt at virka væl í gerandisdegnum. Í sambandi við at PM fylti 50 ár, bjóðaði fyritøkan starvsfólkum við makum til Edinburgh í vikuskifti, har veitsla eisini varð hildin.

Onnur tiltøk so sum grilldagar, veitslur, útferðir, jólahald, jubilæum, ítróttartiltøk, sjónleikur og líkandi eru leypandi á skrá og eru við til at seta lit á felagskapin.

Kantinan, sum bjóðar frálíka matarskipan á morgni og middegi, er savningarstað hjá starvsfólkunum - bæði í gerandisdegnum og til veitslur og kunningartiltøk.

PM miðar ímóti at hava javnt kynsbýti í øllum leiðslufunktiónum, sum er partur av heimsmálinum hjá ST um javnstøðu millum kyn. Nevndir og leiðslur í PM og PM Pluss uppfylla málsetningin og hava gjørt tað í rúma tíð. PM hevur eina yvirvág av monnum og PM Pluss av kvinnum. Hetta kemst av, at størvini eru og søguliga hava verið kynsuppdeild. Málið er tí ikki beinleiðis at skapa javnvág við 50/50, men at syrgja fyri, at øll hava javnbjóðis møguleikar at trívast í størvunum.

PM samtakið hevur í nógv ár havt starvsfólk í tillagaðum starvi og í arbeiðsbúgving og hava vit góðar royndir av hesum. Talan er um fólk við skerdum arbeiðsføri - bæði varandi og í styttri tíðarskeið .

| Starvsfólk 2023/24 | Ársverk | Starvsfólk | Tjóðskapir | Starvsaldur | Sjúkrafrávera* |
|---|---|---|---|---|---|
| P/F Poul Michelsen** | 57,38 | 59 | 11 | 10,71 | 4,9 |
| P/F PM Pluss | 71,71 | 110 | 18 | 4,59 | 5,4 |
| Kjøtbúðin | 7,95 | 9 | 1 | 9,82 | 5,8 |
| **PM Samtakið** | **134,96** | **178** | **24** | **6,89** | **5,2** |

* Sjúkrafrávera er frá 01.01.23 til 31.12.23. Hini tølini fylgja roknskaparárinum 01.05.23 til 30.04.24.

* Sjúka, sum varar longri enn 2 mánaðir er ikki tikin við í miðal sjúkrafráveru

** Atlas Flutningur er partur av tølunum hjá P/F Poul Michelsen

| Kynsbýti Samtak 2023/24 | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| P/F Poul Michelsen | 23,19% | 76,81% |
| P/F PM Pluss | 81,82% | 18,18% |
| Kjøtbúðin | 77,78% | 22,22% |
| **Í alt** | **62,36%** | **37,64%** |

| Kynsbýti Leiðsla 2023/24 | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| P/F Poul Michelsen | 33,33% | 66,67% |
| P/F PM Pluss | 66,67% | 33,33% |

| Kynsbýti Nevnd 2023/24 | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|
| P/F Poul Michelsen | 50% | 50% |
| P/F PM Pluss | 66,67% | 33,33% |
| Kjøtbúðin | 0% | 100% |

| Uppmøting nevnd 2023/24 | |
|---|---|
| P/F Poul Michelsen | 100% |
| PM Pluss | 100% |
| Kjøtbúðin | 100% |

**Tjóðskapir**

Seinastu árini er føroyska samfelagið vorðið alt meira fjølbroytt við alsamt fleiri tjóðskapum.

Tað er av stórum týdningi, at vit taka væl ímóti tilflytarum og stuðla teimum í at gerast partur av samfelagnum og av okkara felagsskapum, samstundis sum vit taka við læru av teirra virðismikla ískoyti.

Virksemið í Føroyum er so stórt, at tað fyri nógvar fyritøkur ikki hevði verið møguligt at virka uttan arbeiðsmegina, sum legst afturat úr øðrum londum.



## Góðkend mál

PM samtakið fekk í januar góðkenning frá The Science Based Targets initiative - stytt SBTi.

Seinastu 3 árini hevur samtakið arbeitt við at seta sær mál innanfyri burðardygt virksemi. Vit fegnast tí um, at Science Based Target initiative nú hevur góðkent langtíðar málini hjá okkum um burðardygt virksemi í samsvari við altjóða krøv og standardir. Arbeitt verður innanfyri fleiri økir, so sum at:

- Minka um $CO_2$ útlátið
- Verja lívfrøðiliga margfeldið
- Minka um burturkastið og
- økja um endurnýtsluna

SCIENCE BASED TARGETS

DRIVING AMBITIOUS CORPORATE CLIMATE ACTION

Vit meta tað vera sera umráðandi at taka ábyrgd av egnari ávirkan á umhvørvið og vilja tí áhaldandi arbeiða fyri at gera okkara virksemi meira burðardygt fyri okkara starvsfólk, okkara kundar og okkara framtíð

## Veðurlagsbroytingar

P/F Poul Michelsen samtakið hevur sett sær fyri at minka $CO_2$ útlátið á vav 1 og 2 við 50% í tíðar-skeiðnum 2020-2030, sum er í tráð við altjóða ásetingarnar í París sáttmálanum. Átøk eru sett í verk, sum skulu gera tað møguligt at røkka málinum. Vit fegnast um, at tølini peika rætta vegin og hetta hóast fyritøkan sama tíðarskeið hevur økt um virksemið. Hóast vit eru byrjað at hyggja eftir $CO_2$ útláti á vav 3, so er enn langt á mál, men arbeitt verður við hesum.

| PM $tCO_2e$* | 2020** | 2021 | 2022 | 2023 | 2020-2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vav 1 | 472 | 445 | 444 | 426 | -9,75% |
| Vav 2 | 313 | 327 | 268 | 286 | -8,63% |
| Samanlagt | 785 | 772 | 712 | 712 | -9,30% |

| PM Pluss $tCO_2e$ | 2020** | 2021 | 2022 | 2023 | 2020-2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vav 1 | 65 | 48 | 50 | 50 | -23,08% |
| Vav 2 | 23 | 26 | 27 | 25 | 8,70% |
| Samanlagt | 88 | 74 | 77 | 75 | -14,77% |

* PM $tCO_2e$ umfatar P/F Poul Michelsen heilsølu, Kjøtbúðina og Atlas Føroyar

**Tølini fyri $tCO_2e$ eru framleidd við $CO_2$ roknaranum hjá Umhvørvisstovuni á us.fo. Annað amboð hevur verið nýtt undanfarin ár og tí kunnu væntast frávik í mun til áður rapporterað tøl. Yvirskipaða gongdin er tó hin sama. Tøl fyri 2020 eru sett inn í frymilin fyri 2021, tí roknarin hevur ikki møguleika at tøppa inn 2020.




Fyrstu 3 árini er minkingin fyri PM samtakið -11,36% á vav 1 og -7,44% á vav 2. Samanlagt er minkingin -9,85% á vav 1 og 2. Hetta er í absoluttum tølum og talan er sostatt um eina ítøkiliga minking, hóast virksemið er vaksið hetta sama tíðarskeiðið.

## Hitaendurvinningarskipan avloysir oljufýrini

Í sambandi við bygging av nýggjari frystigoymslu varð ein nýggj hitaendurvinningarskipan tikin í nýtslu. Køli-og frystiskipanin framleiðir orku, sum verður vekslað til upphiting av PM og PM Pluss bygningunum. Hetta hevur við sær, at oljufýrini í PM og PM Pluss eru tikin frá og verða einans nýtt, um endurvinningar-skipanin svíkur. Upphitingin á matriklinum kemur sostatt framyvir frá køli– og frystigoymsluni. Minkingin av CO2 útláti á vav 1, orsakað av hesi íløgu, fer væntandi at vísa seg í komandi ári.

## Burðardyggari koyring

Eitt annað øki, sum vit arbeiða við, er at minka um CO2 útlátið á vav 1 við meira orku effektivari koyring. Hetta verður framt við ymiskum átøkum:

| Lastbilar | Vørubilar | Persónbilar | elbilar |
|---|---|---|---|
| 8 | 11 | 8 | 8 |

- Nýkeyp av bilum
- Effektivar rutur
- Títtleiki av koyring
- Effektiv koyring

Tá nýggir bilar verða keyptir, er málið altíð, at nýggi bilurin er burðardyggari enn tann, ið fór. Rutur verða leypandi eftirhugdar, soleiðis at vit altíð koyra mest effektivu leiðina. Eisini verður kannað, hvussu ofta vit koyra út til kundarnar og hvussu vit kunnu gera hetta betri.

## Koyriskeið

Í november mánaði skipaði PM fyri koyriskeiði fyri okkara lastbilførarum. IRF og Faroe Ship luttóku eisini og snúði skeiðið seg um at effektivisera koyringina hjá bilførarunum og leggja lag á, hvussu ein skal koyra fyri at minka mest møguligt um CO2 útlátið. Mátingar verða gjørdar áðrenn og eftir skeiðið og komandi tíðin fer at vísa, um átakið gevur úrslit.



## Lívmargfeldi og dálking

P/F Poul Michelsen setti sær í 2020 fyri at minka søluna av einnýtisvørum. Avbjóðingin við einnýtisvørum er partvís, at talan kann vera um ovurnýtslu og ovurframleiðslu, sum hava við sær óneyðuga nógv burturkast. Afturat hesum er tað ein avbjóðing, at einnýtisvørur enda úti í náttúruni, har tær kunnu dálka í langa tíð.

Ítøkilig mál eru tí sett fyri minking av einnýtisvørum generelt og serliga einnýtisvøru úr plasti. Tørvurin er enn hin sami og tí bjóða vit líknandi vørur til leigu frá veitsla.fo, sum kunnu nýtast ferð eftir ferð.

| Mál um at minka einnýtisplastvøru og økja útleigu av fleirnýtisvøru | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Partur av einnýtisvørum, sum eru úr plasti (% av saml. einnýtisvørum) | 31% | 38% | 39% |
| Útleiga frá veitsla.fo av samanberandi vørum (index í nøgd) | 196 | 247 | 100 |

## Burðardygt innkeyp



"Burðardygg vøra". Hetta ljóðar sum eitt gott hugskot og sjálvandi ynskja bæði vit og kundar okkara burðardyggar vørur. Men hvat er so ein "burðardygg vøra"? Svarið er ikki so einfalt, tí atlitini eru nógv og fjølbroytt, so sum:

- sjálv framleiðslan – t.d. útlát og arbeiðsmegi
- brúk av náttúrutilfeingið, har vøran verður framleidd t.d. tøka av vatni, jørð og trøum
- tilfarið, sum verður nýtt til framleiðslu – dálkar vøran, um hon endar í náttúruni ella verður hon niðurbrotin náttúrliga
- flutningurin til Føroya – er talan um stóra frástøðu og harvið langan flutning

Innkeypsdeildin brúkar tíð og orku uppá at læra um ymisku vørurnar og hvussu hesar kunnu verða meira burðardyggar. Hugt verður eftir, um tað er møguligt at bólka vørur eftir burðardygd í telduskipan og síðani seta sær mál fyri innkeypið.

Tað er nærum ómøguligt hjá innkeypsdeildini at nema sær vitan um allar vørurnar, tí PM hevur í ár selt 4.824 ymiskar vørur. Í staðin hevur innkeypsdeildin seinastu árini havt burðardygd á skrá til allar fundir við veitarar og til vørumessu hjá PM verða allir veitarar bidnir um at hugsa burðardygd inn í vøruúrvalið, sum teir vísa fram. Og í hesum sambandi eru vit í teirri hepnu støðu, at okkara veitarar sum oftast eru væl frammanfyri okkum í mun til royndir og vitan, sum ger okkara arbeiði lættari.

Eingin broyting er tó heilt líkatil. Tá talan er um meira burðardygga vøru, fer prísurin ofta upp og til tíðir er góðska ella útsjónd broytt til nakað, sum kundarnir velja frá. Um marknaðurin skal flyta seg til meira burðardyggar vørur, er ein tann mest týdningarmikla uppgávan hjá okkum at fáa kundan og brúkaran við á grønu leiðina og her er okkara vitan og upplýsing lykilin.

## Burturkast og endurnýtsla



Eitt annað av økjunum, sum samtakið arbeiðir við, er at minka um nøgdina av burturkasti og økja um endurnýtsluna. Arbeitt verður í fyrstu atløgu við at fáa nøktandi og rættar upplýsingar til vega um mongdina av ymisku sløgunum av burturkasti. Hetta er neyðugt fyri at kunna seta mál og máta gongdina. Inntil tølini koma uppá plass eru tó ymisk átøk sett í verk.

Tað fyrsta og týdningarmesta er, at vit sum samtak miða ímóti at minka um mongdina av burturkasti mest møguligt. Her er talan um alt burturkast – bæði tað, sum er á skrivstovunum m.a. við at minimera óneyðuga printing av pappíri, men serliga tað, sum kemur av høvuðsvirkseminum á goymsluni.

Við at fokusera uppá minking av burturkasti verða vit samstundis betri til at fremja ábyrgdarfulla nýtslu og framleiðslu, sum er eitt av heimsmálunum hjá ST og harumframt er tað eisini fíggjarliga skilagott.

Arbeitt verður við at skilja tað burturkast, sum kann endurnýtast. Her er talan um t.d. plattar, fløskur, dósir, pappír, papp og plast. Sum nakað nýtt er PM partur av royndarverkætlan, har frukt og grønt, sum ikki kann seljast, verður koyrt til Førka, sum framleiðir biogass burturúr leivdunum.

PM Pluss hevur í eina tíð arbeitt við at minka um nýtsluna av plastposum í skrellispannum hjá reingerðarkundum. Við hesum verða færri plastposar nýttir, samstundis sum pappír verður skilt frá øðrum burturkasti og endurnýtt. Í komandi ári fer PM Pluss væntandi at savna inn slitnar moppur og klútar, sum verða send til Danmarkar, har tey verða endurnýtt og brúkt til at framleiða industriellar rullur.

Vit vóna og vænta, at tað skjótt fer at bera til at fáa samanberandi hagtøl til vega, sum kunnu stuðla undir átøkini og samstundis fara vit at leggja okkum eftir at máta tað, sum vit sjálvi hava møguleika at máta.



## Stuðul og samfelag

Tað er og hevur altíð verið eitt motto hjá P/F Poul Michelsen samtakinum at vit, sum virka í Føroyum, eiga at luttaka í samfelagnum. PM samtakið stuðlar tí nógvum ymiskum felagsskapum, vælgerandi endamálum, ítrótti, gransking, mentan, tiltøkum og átøkum. Miðað verður eftir at stuðla breitt - bæði landafrøðiliga og innan ymisk øki. Royndirnar vísa, at smærri stuðulsupphæddir ofta gera stóran mun hjá sjálvbodnum felagsskapum.

Nøkur samstørv hava vart í nógv ár og onnur koma og fara - alt eftir tørvinum. Av samstørvum, sum hava verið í nógv ár, kunnu millum annað nevnast:

Team Rynkeby Føroyar, ið er ein felagsskapur, sum PM hevur verið við til at stuðlað, síðan hann var settur á stovn í 2013. Team Rynkeby Føroyar savnar inn pening til børn við hættisligum sjúkum og familjur teirra.

Reyði Krossur, sum er virkin á nógvum økjum - bæði í Føroyum og úti í heimi - er eisini ein felagsskapur, sum PM hevur samstarvað við ígjøgnum nógv ár.

Hondbóltssamband Føroya, sum hevur gjørt eitt megnar arbeiði fyri at menna føroyskan hondbólt og ikki minst ungdóm, er eisini eitt av samstørvunum, sum hava verið í eitt longri áramál. P/F Poul Michelsen hevur síðan 2015 verið høvuðsstuðul í føroysku steypakappingini í hondbólti, eisini nevnd Faxe Kondi kappingin. Nýggjur sáttmáli er júst undirskrivaður og er galdandi komandi tvey árini.






**Fleiri upplýsingar fáast her:**

**PM** tel: 354650 - tp: pm@pm.fo

**PM Pluss** tel: 354656 - tp: info@pmpluss.fo

**Veitsla.fo** tel: 204656 - tp: veitsla@veitsla.fo